## Lærarastørv
# í Fuglafjarðar skúla

**Hesi størv verða lýst leys til setanar:**

- **4 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009** fyri lærarar í farloyvi, lækkað tímatal og serligan tørv.
- **1 lærari í tíðaravmarkað starv frá 1. sept. og alt skúlaárið 2008/2009** fyri lærara, ið fer frá við eftirløn.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Førleikakrøv:**
Tey, ið verða sett í lærarastørvini, skulu hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í ávísum lærugreinum

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Tímatalið til eitt av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. september 2008.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 16. juni kl. 10.**

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 737761. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

## Fuglafjarðar skúli
**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður · Tlf. 737760**

**Fuglafjarðar skúli** hevur komandi skúlaár umleið 290 næmingar í 16 flokkum, og her koma at starvast 34 fólk. Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo

---

**Sankta Frans skúli**
Varðagøta 10 - 100 Tórshavn.
Tlf. 302530 – Fax. 302531
www.skulin.fo/fra

## Lærarastørv í Sankta Frans skúla

Lýst leyst til setanar frá **1. august 2008**

**Søkt verður eftir 7 lærarum**
- fimm lærarum í tíðaravmarkað starv ská.2008/09. Størvini eru fulltíðarstørv
- einum lærara í parttíðarstarv, sum er tíðaravmarkað ská. 2008/09
- eitt starv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 1. okt 2008

Tíðaravmarkaðu størvini og parttíðarstarvið eru fyri lærarar, ið hava farloyvi, lækkað tímatal, tímar vegna serligan tørv og at lesa avlopstímar

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- eru við til áhaldandi at menna skúlan

**Harafturat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum uppgávum:**
- flokslæraraarbeiði
- undirvísa í ítrótti/svimjing
- undirvísa í føroyskum, enskum, donskum og støddfrøði
- undirvísa í tónleiki
- undirvísa í handaligu lærugreinunum

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avrit av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi **leygardagin 21. juni 2007. kl. 12.00**

Nærri fæst at vita um størvini hjá Selmar Jacobsen, skúlastjóra, á telefon 302532/220716 ella hjá Jákup Lindberg, varaskúlastjóra, á tlf. 302533/282533.

*Í Sankta Frans skúla eru 300 næmingar í forskúla til 7. flokk. Í skúlanum starvast 30 lærarar. Skúlin hevur ein lærarahóp, ið fakliga røkkur víða og arbeitt verður alsamt við at menna skúlan.*

---

**Sankta Frans skúli**
Varðagøta 10 - 100 Tórshavn.
Tlf. 302530 – Fax. 302531
www.skulin.fo/fra

## Forskúlalærarastarv í Sankta Frans skúla

**Søkt verður eftir forskúlalærara skúlaárið 2008/9**

Av tí at ein forskúlalærari fer í farloyvi, verður søkt eftir avloysara komandi skúlaár.
Starvið verður sett **1. august 2008**
Fyrimun hava umsøkjarar við royndum í líknandi arbeiði
Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.
Lønarbrotið er 0,47

**Vit vænta, at tú:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan
- ert fyrikomandi, virkisfús/ur og hugað/ur fyri toymissamstarvi

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi **leygardagin. 23. juni 2008. kl. 12.00**

Nærri fæst at vita um størvini hjá Selmar Jacobsen, skúlastjóra, á telefon 302532 / 220716 ella hjá Jákup Lindberg,varaskúlastjóra, tlf. 302533 / 282533

*Í Sankta Frans skúla eru 300 næmingar í forskúla til 7. flokk. Í skúlanum starvast 30 lærarar. Skúlin hevur ein lærarahóp, ið fakliga røkkur víða og arbeitt verður alsamt við at menna skúlan*

---

**Sankta Frans skúli**
Varðagøta 10 - 100 Tórshavn.
Tlf. 302530 – Fax. 302531
www.skulin.fo/fra

## Størv sum stuðlar í Sankta Frans skúla

Søkt verður eftir 4 stuðulsfólkum, ávikavist 15, 20, 25 og 27 tímar um vikuna, skúlaárið 2008/9 til næmingar við serligum tørvi.

Fyrimun hava umsøkjarar við royndum í mennandi stuðulsarbeiði og viðkomandi útbúgvingum.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Vit vænta, at tú:**
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan
- ert fyrikomandi, virkisfús/ur og hugað/ur fyri toymissamstarvi

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi **leygardagin. 21. juni 2008. kl. 12.00**

Nærri fæst at vita um størvini hjá Jákup Lindberg,varaskúlastjóra, tlf. 302533/513074 ella hjá Selmar Jacobsen, skúlastjóra, á telefon 302532/220716.

*Í Sankta Frans skúla eru 300 næmingar í forskúla til 7. flokk. Í skúlanum starvast 30 lærarar. Skúlin hevur ein lærarahóp, ið fakliga røkkur víða og arbeitt verður alsamt við at menna skúlan.*

---

**Leyst starv**

## Kokkur til Strandfaraskip Landsins

Søkt verður eftir kokki til Strandfaraskip Landins at seta í fast starv frá 7. juli 2008.

Freistin at søkja starvið er mánadagin 23. juni kl. 12:00

Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Lesið Sosialin -tað loysir seg